Viðmerking:

Gud er kærleiki?

Svar til Sonna Jacobsen

Í lesarabrævi mínum kallaði eg Gud fyri barnamordara, manschauvinist og diktator. Als ongar roynditr vórðu gjørdar fyri at royna at mótprógva hesum ákærum – eg vóni, at hetta er tí at tað datt burturímillum, og ikki tí at tær eru sannar. Í staðin varð eg hálovaður við dirvi og klárskygni. hóast Sonni segði seg vera ósamdan við so at siga alt, ið eg segði – sera órkymlandi. Men hann royndi so í minsta lagi at geva nakrar skilagrundir til, at eg noyðist at fara skeivur í hugsanum mínum, at tann Gudurin, ið greitt verður frá í bíbliuni, er óndur, og hesum fari eg at royna at mótprógva.

–"*Um Gud var verdiliga óndur, so kundi Gud fyri tað fyrsta kovrt øll menniskju fortapt*", sigur Sonni í viðmerking sínari. Ein kann vera óndur á ymiskan hátt. Sonni vil vera við, at av tí at Gud ikki tveitir okkum øll, men bert nøkur í eldin (ella rættari: tey flestu – "tí trongt er portrið, og mjaur er vegurin, ið fórir til lívs, og fá eru tey, ið finna hann." Matt. 7,14), er tað prógv um, at Hann er góður. – Hitler tveitti heldur ikki øll í eldin, bert nøkur: er hann so góður?

Hetta líknilsi við Hitler er sera veruleikakent, hóast nógv fara at taka tað illa upp. Eisini hann var ein diktatorur, ið drap øll tey, ið ikki vóru samd við hann. Eisini hann hevði eina sokallaða "frelsu" fyri sítt fólk, men fyri at kunna undirgeva seg honum og fáa lut í hesi frelsu, mátti ein góðtaka, at onnur vórðu myrd og brend av honum. Í dømi Hitlers høvdu hesi verið jødarnir, og viðvíkjandi Gudi má ein góðtaka, at øll onnur enn tey, ið undirgeva seg Honum, verða, ikki bert myrd og brend, men pind í allar ævir, og tað líkamikið um tey vóru góð ella ring menniskju.

–"*Var Gud óndur, segði hann: hata, hata, hata... Gud sigur: elska, elska elska!*", vitnar Sonni. – Hitler tosaði við stórum, stoltum orðum um bróðurkærleika. Lurtar ein bert eftir tí, hann segði, var Hitler jú eitt stástfólk, men hann gjørdi nøkur ting, ið ikki kunnu orsakast, og hesi ting eru ikki í námind av tí ævigu pínuni í helviti.

–"*Tá eg bruki bíbliunnar mátistokk fyri kærleika, náði og miskunn, so má eg siga við Paulusi: I mær býr einki gott!*" sigur Sonni í viðmerking sínari. Hetta átti so at havt við sær, at bert kristin menniskju gjørdu gott, og vit vita jú, at so er ikki.

–"*Men tökk fái Gud, at hann er so góður og kærleiksfullur, at mær tórvast als ikki at óttast kortini*", heldur hann so á, og gloymir eyðsæð, at tað er Gud sjálvur, sum er orsøkin til at óttast frá fyrstani av – Hann skapti jú helviti og allar hesar reglurnar um revsing og "allergi móti synd".

Síðani vil Sonni vera við, at Gud lønir góðgerðum og revsar óndskap; lat okkum hugsa eitt sindur um hetta.

–"Tí at øll hava syndað og teimum fattast dýrd Guds", sigur Rombrævið 3:23. Øll eru ófullkomin og hava brúk fyri fyrigeving fyri at sleppa undan eldinum (sum bert er har, tí at Gud hevur skapt hann). Paulus forfylgdi teimum kristnu og drap tey, men síðani bað hann um fyrigeving og alt var so í lagi. Mohandas Ghandi var harafturímóti eitt tað mest fyrimyndarliga menniskja, ið hevur livað, men hann vildi ikki gerast kristin, hóast hann hevði lisið Bíbliuna og er tí, sambært Sonna, tryggjaður eitt pláss á fremsta rað í helviti.

– Tað er eyðsæð, at tað Gud leggur dent á, er ikki at tú ert góður, men bert at tú ert undirgivin.

Rom. 5,1 og 8,1, sum Sonni vísir til, eru júst prógv um tað, eg segði í seinasta lesarabrævinum; at Gud skapar okkum ófullkomin, og síðani krevur, at vit júst skulu vera fullkomin, fyri at liva upp til hansara standard. Kunnu vit ikki tað (og tað eru vit júst gjørd til ikki at kunna av Honum sjálvum), so er bert ein vegur undan æviga eldi helvitis: at fella á knæ og biðja um fyrigeving fyri at vera tað, ið Hann hevur gjørt okkum at vera: ófullkomin.

Vit kunnu aldrin liva upp til tað, Hann krevur av okkum, júst tí at hann hevur skapt okkum soleiðis sum vit eru, og tí skulu vit bøna og biðja Hann um fyrigeving fyri at vera tey vit eru, ella pínast í allar ævir. – Spyrji tykkum sjálvi: er hetta skilagott?

– "Lærarar eru fólk, sum hjálpa okkum at loysa trupulleikar, ið vit ikki høvdu haft uttan teir", lýðir ein skemtisøga – "Jesus er ein, ið frelsir okkum frá einum fortapilsi, ið hann sjálvur hevur ásett", kundi ein sagt, og so væntar Hann eisini okkara æviga takksemi fyri hetta.

Eisini skal leggjast til merkis, akkurát hvussu vitleyst og ónt hugskotið um helviti er.

–Tá ið vit menniskju revsa onkran, gera vit tað bert við tí í hyggju, at hesin skal læra av revsingini, og hesin fær so ein møguleika aftrat at vísa, at hann hevur broytt seg. Fær hann ikki henda møguleika, halda vit tað vera meiningsleyst at pína viðkomandi á nakran hátt, tað veri seg tongsling ella buking. Ætla vit ikki at geva viðkomandi ein møguleika aftrat, so beina vit fyri honum, men á ein humanan hátt. Vit pína hann í øllum førum ikki.

Men hetta er júst tað, Gud ger. Revsing helvitis er vitleys og ónd, tí at hon er endaleg. Hon hjálpir ikki á nakran hátt, av tí at tey revsaðu aldrin fáa ein møguleika fyri at betra seg. Hon er bert til gagn, um tað ein vil, er at gleðast um pínu teirra revsaðu í allar ævir.

At enda noyðist eg at leggja aftrat, at hóast mítt tónalag kanska ber brá av vreiði, er ætlanin við mínum lesarabrøvum ikki at provokera, men heldur at fáa fólk at hugsa sjálvstøðugt og meta um tað, tey síggja hvønn dag. Tó skal eg eisini viðganga, at eg eri rættiliga argur av at fáa prædika, at "í mær býr einki gott", "Herrens veje er uransagelige", og at ein eigur at tiga og lurta í lítillætni – nakað sum bert ger fólk til ræðuskítar, ið blunda og gapa.

Sonni kann ikki vísa á rættvísi Guds við at sitera frá Bíbliuni, at "Gud er góður", "Gud er kærleiki" o.s.fr. – Hetta má grundgevast.

Sjálvandi sigur Gud seg ikki vera órættvísan. Sjálvandi sigur Gud ikki "Hata, hata, hata!" – Tað gjørdi Hitler heldur ikki.

John Johannesen



Esmar Andreasen, Boði Haraldson, býarverkfrøðingur og Tróndur Húsgarð, arbeiðsformaður

25 ár í starvi hjá Tórshavnar býráð

EIRIKUR LINDENSKOV

Friggjadagin fingu tveir stravsmenn hjá Tórshavnar býráð, Esmar Andreasen og Tróndur Húsgarð, handað gávubrøv frá Boða Haraldson, býarverkfrøðingi í sambandi við, at teir hava verið í starvið hjá býráðnum í 25 ár.

Esmar Andreasen, sum er havnarmaður, byrjaði hjá Tórshavnar Kommunu í 1974 - og var hann í gøtuljósadeildini, sum tá helt til í Bringsnargøtu. Í 1987 flutti deildin oman í vaskaríið í Tórsgøtu og í 1993 varð aftur flutt - hesaferð í gamla verkstaðið hjá Carlo Petersen í Tórsfinsgøtu, har margarinfabrikkin hjá Eli Rubeksen var til fyrst í sjeytiárunum. Har húsast eisini Vatnverkið.

Tróndur Húsgarð byrjaði sum arbeiðsformaður hjá Tórshavnar kommunu tá Kaldbaksvegurin varð gjørdur. Tá hetta arbeiðið var liðugt í 1980, kom hann inn í býin av arbeiða sum arbeiðsformaður, og hevur hann staðið fyri ymsum arbeiðum, eitt nú kloak- og vegaarbeiði eins og øðrum smærri umvælingararbeiðum, sum kommunan sjálv hevur staðið fyri.

Tróndur Húsgarð, sum er ættaður úr Gøtu, er eisini spreingimeistari.

Elf vil eisini hava Saga

Fríggjamorgunin kom franska oljufelagið Elf Aquitaine við einum tilboðið til partabrævaognararnar í Saga Petroleum. Tilboðið er 8 prosent hægri enn tað Norsk Hydro/Statoil bjóðaðu hósdagin. Franskmenninir bjóða at gjalda kontant og serfrøðingar roknað við at Elf-tilboðið lokkar meir. Eisini ætlar Elf at varðveita Saga Petroleum sum egið felag

JÓGVAN HUGO GARDAR SKRIVAR ÚR OSLO

Bæði Saga Petroleum og Elf váttaðu fyrrapartin í gjár at tilboðið er lagt fram. Men partarnir vildu ikki siga meir um innihaldið. Tilboðið frá franskmonnum kemur aftaná at Norsk Hydro og Statoil hósdagin samdust um eina avtalu sum hevur til endamál at fletta Saga Petroleum og at skifta krovið millum partarnar. Eygleiðarar roknaðu hósdagin við at einki útlendsk oljufelag tordi at koma við einum tilboði, tí norska stjórnin so klárt hevur sagt at hon ynskir eina loysn har virðini í Saga Petroleum verða verandi í Noregi.

Pengarnar á borðið

Tað hava í fleiri dagar gingið søgur her í Oslo um at Elf Aquitaine arbeiddi við einum tilboði, og fríggjamorgunin kom so hetta boð. Munurin á hesum tilboðnum og tí hjá Norsk Hydro, er at Elf bjóðar Saga-eigarunum pengar fyri partabrøvini. Norsk Hydro bjóðar harafturímóti Saga-eigarunum partabrøv í Norsk Hydro í staðin. Elf bjóðar 115 norskar krónur fyri hvørt Saga-partabræv, og Elf heldur at tað er í lagið um teir bert 67 prosent av ognarunum góðtaka tilboðið. Elf metir at Saga hevur eitt virði upp á umleið 17 milliardir norskar krónur (15,3 milliardir føroyskar krónur) Fíggjarserfrøðingar sum norska Nettavisen var í samband við fríggjamorgunin siga at tilboðið er sera gott, og at hetta ikki kan steðgast av politikkarunum.

Samleikin varðveitast

Nevndarformaðurin og ovasti stjóri í Elf Aquitaine, Philippe Jaffre, sigur at teir hava ætlan um at Saga Petroleum framvegis skal vera eitt kent navn í norskari oljuvinnu. Saga Petroleum skal varðveita sín samleika í Norðsjónum, sigur Elf-stjórin í samrøðu við netútgávuna DNajour.

Saga Petroleum hevur ein sterkan samleika í norskari oljuvinnu, og tað ynskja vit at felagið eisini skal hava í framtidini.

Philippe Jaffre sigur at hetta tilboðið er í tráð við langtíðarætlanina hjá felagnum um at keypa seg inn í leiting og framleiðslupartin av gass- og oljuvinnuni. Hann metir at tilboðið hjá Elf er ein betri trygd hjá starvsfólkunum í Saga Petroleum. Norsk Hudro/Statoil hava ætlanir um at alt virksemið hjá Saga á landið skal gevast.

Virkandi norski oljumálaráðharrin, Anne Enger Lahnstein, ynskti ikki at siga ov nógv fríggjamorgunin. Hon segði bert at hetta er tað ein má rokna við, og at hetta er ein partur av spælinum. Anne Enger Lahnstein skal í juni vitja í Føroyum, men tá kemur hon sum mentamálaráharri, men oljuspurningar koma sjálvandi eisini á loft tá.

REPRO Z
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prenthlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo